# Í fallskíggja yvir høvuðsstaðnum

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin minni vindur av norði og um kvøldið regn. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av norði um kvøldið minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Fleyr til gul av eystri, seinnapartin upp í stívt andøvsgul av landnyrðingi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagin upp í stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og okkurt ælið. Mikudagin lot til andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 17 stig.

**Í gjárkvøldið var onkur farin ein heldur øðrvísi kvøldtúr í høvuðsstaðnum**

FRÍTÍÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tey vóru mong, ið gingu sær ein góðan túr í gjárkvøldið og bara lótu tankarnar sveima avstað. Tað var eisini onkur, sum sveimaði avstað bókstavliga – altso sveimaði í luftini. Tí meðan fleiri gingu sær ein túr í høvuðsstaðnum, so var tað onkur annar, sum fleyg ein túr.

Fólk sum vóru utttandura, tá um 20.30-tíðina í gjárkvøldið, siga at tað ljóðaði mestsum eitt lítið privatflogfar var heilt nær við. Men tað vísti seg altso at vera eitt fólk á flogi.

Tí í fallskíggja við motori kom onkur flúgvandi uppi yvir Havnini. Einar hálvthundrað metrar uppi í luftini fleyg hetta fólki yvir við Strond, uppi yvir Norðurlandahúsinum og niðan móti Hotel Føroyum. Eftir hvat skilst gekk leiðin seinni út móti Havnardali, har viðkomandi settist eina løtu, eftir frálíka góða men óvanliga kvøldtúrin.



*Eitt fólk á flogi uppi yvir høvuðsstaðnum í gjár*
*Mynd: Ása Poulsen*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 17 |
| Nuuk | 14 |
| Qaqortoq | 17 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 14 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 26 |
| Bukarest | 32 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 35 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 33 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 13 |
| New York | 30 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | -- |
| La Paz | 2 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 1 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1001 hPa. skamt í landnyrðing úr Føroyum grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1006 hPa. í útsynning úr Írlandi fer móti Skotlandi og dýpist.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Skotland fer spakuliga í landnyrðing og grynnist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 9/7 kl. $06^{00}$ – 10/7. $06^{00}$. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/7 kl. $06^{00}$– 2/7 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juli: 28,0 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

7. juli — Seinna kvarter
Jørðin longst frá sólini
9. juli — Mánin næstur jørðini
14. juli — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2007

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 13. Juli | 06.17 | 18.47 | 05.17 | 17.47 | 05.32 | 18.02 | 08.17 | 20.47 | 09.17 | 21.47 | 04.32 | 17.02 | 03.32 | 16.02 | 06.32 | 19.02 | 07.32 | 20.02 | 06.02 | 18.32 | 07.17 | 19.47 |
| 14. Juli | 07.16 | 19.45 | 06.16 | 18.45 | 06.31 | 19.00 | 09.16 | 21.45 | 10.16 | 22.45 | 05.31 | 18.00 | 04.31 | 17.00 | 07.31 | 20.00 | 08.31 | 21.00 | 07.01 | 19.30 | 08.16 | 20.45 |
| 15. Juli | 08.12 | 20.40 | 07.12 | 19.40 | 07.27 | 19.55 | 10.12 | 22.40 | 11.12 | 23.40 | 06.27 | 18.55 | 05.27 | 17.55 | 08.27 | 20.55 | 09.27 | 21.55 | 07.57 | 20.25 | 09.12 | 21.40 |
| 16. Juli | 09.04 | 21.29 | 08.04 | 20.29 | 08.19 | 20.44 | 11.04 | 23.29 | - | 12.04 | 07.19 | 19.44 | 06.19 | 18.44 | 09.19 | 21.44 | 10.19 | 22.44 | 08.49 | 21.14 | 10.04 | 22.29 |
| 17. Juli | 09.51 | 22.13 | 08.51 | 21.13 | 09.06 | 21.28 | 11.51 | - | 00.29 | 12.51 | 08.06 | 20.28 | 07.06 | 19.28 | 10.06 | 22.28 | 11.06 | 23.28 | 09.36 | 21.58 | 10.51 | 23.13 |